## ... um at verða klaksvíkingur:

- Eg eri ógvuliga heppin at verða vaksin upp í tí umhvørvinum, sum eg eri vaksin upp í. Eg føli, at eg skyldi hesum býnum øgiliga nógv. Eg eri ankraður í eini ógvuligari góðari familju. Og tí er ein sjálvsagt ógvuliga góður við hetta plássið.

## ... um KÍ:

- Eg havi fingið eitt hav av vinfólkum, við at verða aktivur í KÍ. Ein minnist aftur á tíðini, tá ein var aktivur við størri gleði. Tá eg var spælari var eg so konsentreraður, at ofta gav eg mær ikki far um hvørjir mótstøðuspælararnir vóru. Tað er ikki fyrr enn ein var vorðin eldri, at ein dugdi betur at njóta tað, og sá tað sum ein forrætt at fara inn og spæla ein dyst frammanfyri nógvum áskoðarum.

# n fór um tey 40

**Lurti eftir**

**samrøðuni við John William Joensen á Rás2, fríggjadagin 20. februar kl. 11.10.**

var heldur naivt at vænta eitt lærlingapláss, serliga tá ein boðaði frá, at ein fór ikki at arbeiða har, tá ein var útbúgvin. Stig Rasmussen helt kortini, at umbønin hjá John Williami var original: - Stig ringdi til mín, og tað fyrsta hann spurdi um, var um eg var eitt konufólk? Nei svaraði eg. Hann segði, at hann hevði fleiri konufólk á Estra, men har var alt blivið uppá vegin. So hann skuldi ikki hava fleiri konufólk, tað skuldi verða eitt mannfólk. Og John William tók av.

### Stórtrívist á Norðlýsinum

John William er fegin um at starvast á Norðlýsinum, har hann kemur í samband við nógv fólk. Og tá ein er opin, blíður og fyrikomandi, sum er borið John Williami og Oliveri, so fær ein nógv góð prát á redaksjónini, og eisini tá teir fara at vitja runt í Klaksvík og í Norðoyggjum. John William viðgongur, at tað er nakað heilt serligt at starvast saman við pápa sínum, men hann heldur, at Oliver er lættur at samstarva við. Saman hava teir ment Norðlýsið til at verða bæði ein internetsmiðil við nógvum kjaki, umframt at verða eitt blað, sum verður borið í hvørt húski í Eysturoynni og í Norðoyggjum. Haraftrat koma túrarnir til London og París, sum blaðið skipar fyri. Norðlýsið hevur verið røddin hjá Norðoyggjum í nærum fulla øld nú, og hóast mong ættarlið eru sokkin í mold, og øll tøknin er skift út, síðani Norðlýsið kom út á fyrsta sinni í 1916, so er aðalsetningurin tann sami. At verja borg, og at bera tíðindi úr nærøkinum. Við internetsútgávuni er tað vorðið lættari at samskifta við klaksvíkingar, sum búleikast aðrastaðni, og sum búleikast kring knøttin. John William og Oliver fáa eisini nógvar afturmeldingar frá klaksvíkingum í útlegd. – Vit hava roynt at dyrka tann skógin, sum er her norðuri, og hava eftir førimuni givið okkara íkast til samfelagskjakið. Greiður John William frá, men hann staðfestir, at vinkulin teir aloftast brúka, verður mettur út frá nærøkinum, sum hann og foreldrini eru so góð við. – Vit hava ein ótrúliga góðan uppbakning, ikki minst tá tað kemur til lýsarar til blaðið. Tá hava vit veruliga notið gott av einum býi, sum Klaksvík.

### Bert tveir á redaksjónini

John William fegnast um, at klaksvíkingar lyfta saman, tá tað kemur til einasta prentaða miðil uttanfyri høvuðsstaðin. John William viðgongur tó, at teir hava ikki sama fólk, sum aðrir miðlar. Tað eru bara hann og Oliver á redaksjónini, og tað er ikki altíð hann og Oliver fáa tíð at práta saman um tað, sum teir hvør særis skriva. Tað kann tíðum verða ringt at taka harðliga til orðanna í einum minni samfelagi, men John William heldur, at verulig vinarløg hevja seg upp um tjak og greinar um samfelagsmál, um enn ein kann verða ósamdur um tey ymisku málini. Klárar eitt vinarlag ikki, at ein er ósamdur, so er slíkt vinarlag lítið vert. – Hevur tú tey røttu argumentini, so lurta fólk eftir tær. Hevur tú ikki tey røttu argumentini, so tíma fólk ikki at lurta eftir tær. Staðfestir John William. Blaðið gekk á odda at stríðast ímóti einum valdømi, og blaðið stuðlar eisini allari menning av undirstøðukervinum kring landið, har ímillum eisini undirsjóvartunnilin til Sandoynna. John William metir, at vit eiga at verða á varðhaldi, at Føroyar verða eitt fjøltáttað land í framtíðini, og ikki miðsavnað, sum ein annar norðurlendskur provinsbýur. John William vónar kortini ikki, at hann hevur traðkað niður á onnur lokaløki í landinum, við sínum stríði fyri nærøkið. Tað hevur ikki verið meining hansara.

### Fyrimunur at verða stórur

John William heldur, at tað er so skjótt, tá ein býr á einum størri staði, at ein gerst líkasælur við tey smærru økini í landinum. – Vit sum búgva í størri samfeløgum hava verri við at skilja tey, sum búgva í smærri samfeløgum. Og um fólkini frá smáu plássunum ikki kenna, at vit hava áhuga fyri teimum, og at vit ikki eru jalig, tá tey koma at vitja okkum. Um vit bara svara, at tey tað sama kundi búð í Havn ella í Klaksvík, tá er illa vorðið. - Tað er ein keðiligur hugburður, og slíkur hugburður fer at minka um Føroya-kortið hjá okkum. Og eg síggi onga orsøk til at minka Føroya-kortið. John William letur ongan iva verða um, hvar hann stendur í slíkum málum. - Tað kann ikki verða ein størri visjón fyri ein føroyskan politikkara, enn at tað skal verða liviligt allastaðni í Føroyum, og at allir føroyingar skulu hava somu møguleikar. John Williami líkar illa, at summi seta undirsjóvartunnlar og undirstøðukervið upp ímóti teimum sokallaðu bleytu virðunum. – Undirstøðukervið eigur at verða grundarlagið undir, at føroyingar kunnu búleikast kring alt landið. Tað sæst á John Williami, at hesin setningurin er eitt kardinalpunkt hjá redaksjónini hjá Norðlýsinum. Norðlýsið er eisini ein av bestu moralsku stuðlunum hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og virkseminum har. John William harmast, at farið er burtur frá politiskum valdum nevndum: - Tí hvør er betri fyri at meta um tørvin hjá samfelagsborgarunum, uttan júst teir fólkavaldu. Við at velja politiskar nevndir, so valdi ein jú umboð fyri brúkarnar. John William óttast fyri, at framtíðar heilsuverkið í Føroyum ikki verður so væl innrættað til brúkaran.

### Væntar betri tíðir fyri KÍ

Stóra hjartabarnið hjá John Williami er KÍ. Honum untist at verða partur av KÍ-liðnum, sum vann Føroyameistaraskapið í 1991, og eru summir frá tí liðnum millum teir bestu vinmennirnar hjá honum. Í skrivandi stund sita John William og hinir nevndarlimirnir og gera formansfrágreiðingina klára til aðalfundin hjá KÍ. – Eg sá yvirlitið yvir vunnin heiðursmerki í 2008. KÍ vann 7 gullmerki í fjør, meðan nærmasti kappingarneytin, HB bert vann 4 gullmerki ífjør. John William er ikki sørt bringubrattur, tá hann ramsar hagtølini upp. John William hevur eygleitt venjingarnar hjá Formulahópinum hjá KÍ, og hann hevur borið eyga við nógvar ungar spælarar, sum hann heldur kunnu fara at gera vart við tey komandi árini. – Tað kann bara spyrjast nakað gott burtur úr, og tí eri eg bjartskygdur um framtíðina hjá KÍ. Og eg ivist onga løtu í, at KÍ fer at hava eina øðiliga glæsiliga framtíð. John William følir seg sum nevndarlim í KÍ ikki at verða undir trýstið, nú KÍ ikki hevur vunnið hvørki landskapping ella steypakapping síðani 1999. John William metir, at hópurin sum KÍ hevur tøkan í dag fer at røkka langt. Men hann staðfestir, at neyðugt er eisini at hava tað tiltikna hepnið við sær. – Tekur tú unglingarnar hjá okkum, so hava teir verið í teimum síðstu fimm steypafinalunum, men hava bara vunnið eina av hesum fimm finalunum. Høvdu teir vunnið tríggjar ferðir, so høvdu øll tosað um hvussu fantastiskan ungdóm vit hava. John William ber fram sannleikan, at lítið kann skilja millum viðgongd og mótgongd hjá einum stórum fótbóltsfelagi, sum KÍ. John William heldur ikki at tað hevur gagnað føroyskan fótbólti tað stóra, at so stórar peningaupphæddir hava verið uppií leikinum. – Vit hava ikki fingið betri fótbóltsspælarar orsaka av hesum pengunum, men tað eru spælarar, sum hava forvunnið stórar upphæddir. Á mangan hátt hava vit forsømt umstøðurnar kring felagið. Ein hevur brúkt alla fíggjarorkuna uppá spælararnar. Men kanska tað fer at verða meiri fokusera uppá at betra um umstøðurnar nú. Eg trúgvi, at tað er bara gott fyri føroyskan fótbólt, at tær stóru peningaupphæddirnar minka. John William væntar, at tey næstu 40 árini fara at geva KÍ nógv meistaraheiti, og at Klaksvík í síni heild fer at ganga einari glæsiligari framtíð í møti. Spurdur um hvussu nógv fólk hann væntar fara at búgva í Klaksvík í 2049, er John William ikki í iva: - Tá verða vit 15.000 fólk í Klaksvík. Patriotiski stríðsmaðurin á Norðlýsinum fer at gera sítt til, at KÍ og Klaksvík fara at stevna á eina sigurskós í framtíðini.